**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.**
**Bygdarráðsfundur tann 21. november 2017 kl. 20.00**

| | |
|---|---|
| **Bygdarráðslimir á fundi:** | Pauli T. Petersen, Ingi Olsen, Eyðun Hansen, John Zachariassen, Laila Haldansen, Herit Magnussen og Durita á Heygum |
| **Skrivari:** | Maud Poulsen |

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 41**
Áseting av kommunuskattaprocenti, barnafrádrátti og foreldragjaldi fyri børn á dagstovni og í frítíðarskúla.
J.nr. 25.20.00-1-17

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 17. november 2017 málið um áseting av kommunuskattaprocenti, barnafrádrátti og foreldragjøldum.

Nevndin mælir til, at samtykkja, at kommunuskattaprocentið í 2018 verður verandi 21,5% og at barnafrádrátturin í 2018 verður verandi kr. 5.000.

Somuleiðis verður mælt til at áseta somu foreldragjøld sum eru galdandi nú og at hvørt húskið einans rindar fyri eitt barn.

**Viðv. 41**
Tilmæli var einmælt samtykt.

**Mál 42**
2. viðgerð av uppskoti fíggjarætlanini fyri Vestmanna Kommunu fyri 2018.
J.nr. 00.30.10-1-17

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 17. november 2017 uppskot til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2018.

Nevndin samtykti at leggja uppskotið til fíggjarætlanina fyri Vestmanna Kommunu fyri 2018 fyri bygdarráðið til 2. viðgerð.

**Viðv. 42**
Uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2018 var einmælt samtykt við 2. viðgerð.

**Mál 43**
Tilmæli frá Havnarnevndini um dagføring av leigusáttmála, leigugjøldum og reglugerð fyri bátahylin.
J. nr. 04.18.10-1-17

Havnarnevndin viðgjørdi á fundi tann 13. november 2017 møguliga dagføring av leigusáttmála, leigugjøldum og reglugerð fyri bátahylin.

Nevndin mælir til at hækka ársleigugjøldini soleiðis:
- 1.500 kr árliga íroknað mvg fyri bátapláss upp til 2 m breidd
- 2.000 kr árliga íroknað mvg fyri bátapláss upp til 2,50 m breidd
- 3.000 kr árliga íroknað mvg fyri bátapláss upp til 3,30 m breidd

Fyri hvørjar 10 cm, breiddin er omanfyri 3,30 m, verða goldnar 150 kr íroknað mvg

Nevndarlimirnir gera viðmerkingar til leigusáttmálan og reglugerðina til bygdarráðsfundin.

Nevndin mælir til, at broytingarnar koma í gildi 1. januar 2018.

**Viðv. 43**
Laila Haldansen skoytti upp í tilmæli, at gildiskoman verður flutt til 1. januar 2019.
Tilmælið, við broytingini av gildiskomuni, var einmælt samtykt.

**Mál 44**
Tilmæli frá Havnarnevndini um dagføring av leigugjøldum fyri neystalendir.
J. nr. 82.16.00-8-17

Havnarnevndin viðgjørdi á fundi tann 13. november 2017 møguliga dagføring av leigugjøldum fyri neystalendir.
Nevndin mælir til at hækka leigugjaldið upp í 20 kr fyri fermeturin um árið, og at hetta kemur í gildi 1. januar 2018.

**Viðv. 44**
Laila Haldansen skoytti upp í tilmælið, at gildiskoman verður flutt til 1. januar 2019.
Tilmælið, við broytingini av gildiskomuni, var einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 23.00

Sign.:

Pauli T. Petersen Ingi Olsen Eyðun Hansen

John Zachariassen Laila Haldansen Herit Magnussen Durita á Heygum